# Politiskur ódugnaskapur

**Einki røkist fyri betri parkeringsmøguleikum við flogvøllin. Tað er eingin játtan, sigur landsverkfrøðingurin. Politiskur ódugnaskapur, sigur borgarstjórin í Sørvági**

PARKERINGS-VIÐURSKIFTI
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað sær einki út fyri parkeringsviðurskiftunum á flogvøllinum í løtuni. Eingin játtan er á fíggjarlógini, og tí kann einki gerast, sigur landsverkfrøðingurin. Borgarstjórin í Sørvági heldur tað vera beinleiðis ódugnaskap frá politiskari síðu, at einki verður gjørt.

Parkeringsviðurskiftini við flogvøllin hava í áravís verið vánalig. Nógvir bilar standa, tá nógv flogferðsla er, sum Harraguð veit. Tveittir har, eitt pláss fæst. Úrslitið er mangan ein parkeringsbót.

Í fjør varð fingin ein eykajáttan, sum tó ikki varð brúkt, tí arbeiðið kom ikki í gongd, áðrenn árið var endað. Tann játtanin fall so burtur, og eingin er fingin aftur, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Hann sigur, at landsverkfrøðingurin hevur gjørt kanningar av tørvinum við flogvøllin. Hesar kanningar hava víst, at í juli og út í hálvan augsut í fjør var nógv ferðsla og trongd á parkeringsplássinum við flogvøllin. So linkaði aftur, og trupulleikar av týdningi vóru so ikki aftur fyrrn enn um jóltíðir, tá aftur nógv flúgving var.

Landsverkførðingurin sigur, at tá politikararnir nú hava valt at leggja játtanina burtur aftur, ger stovnurin ikki meira.

– Landsverkfrøðingurin fer ikki av sínum eintingum at biða um nakra eykajáttan til arbeiðið, sigur hann.

Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti, sigur, at tað kann so enda við, at leiðslan á flogvøllinum beinleiðis má heita á fólk um ikki at taka bil við, tá tey koma vestur á flogvøllin í einumhvørjum ørindum.

– Tað fer so bara í ringasta føri at raka okkum sjálv aftur í hinum endanum, sigur hann, tí tá kann væntast, at ferðslan gjøgnum Vágatunnilin fer at minka, og so vita vit ikki, hvat hendir við prísinum har.

Borgarstjórin í Sørvági, Eivin Jacobsen, er ikki nøgdur við skilið. Hann kallar tað beinlieðis politiskan ódugnaskap, at einki er hent við parkeringsplássinum. – Tað er sera vánaligt politiskt arbeiði at koma við eini eykajáttan soleiðis seinast í árinum og so bara missa hana burtur aftur, tí arbeiðið ikki fekst í gongd, heldur hann.

Hann metir, at tilrættaleggingin haltaði álvarlsiga hjá teimum sum ábyrgdina høvdu av hasi ætlanini.



*Útlit eru fyri, at parkeringin kring flogvøllin fer at vera so sum so eisini í summar, tá flogferðslan fer at økjast aftur*
*Mynd: Edvard Joensen*

At landsverkfrøðingurin tykist halda, at mynstrið fer at verða tað sama, sum undanfarin ár, skilir hann als ikki.

Eivin Jacobsen vísir á tann grundleggjandi munin, at í fjørsummar var eingin tunnil, og bilarnir stóðu tí í Vestmanna. Í ár ber til at koyra líka á flogvøllin, og hann ivast ikki í, at tað vilja fólk eisini gera.

– Tað hava vit longu sæð, nú tað koyra umleið 700 bilar um dagin gjøgnum tunnilin, vísir hann á.

Jørgen Niclasen, løgtingsmaður sigur, at ein trupulleiki hevur verið, at friðingarmyndugleikarnir ikki hava verið lidnir at viðgera málið. Men tað er nú avgreitt, og so má farast í gongd aftur við at finna pening.

– Tað verður ikki lætt, ásannar hann. Men eg havi reist málið bæði í flokkinum og hjá landsstýrismanninum við vinnumálum, sum umsitir samferðsluna, sigur Jørgen Niclasen, løgtingsmaður Fólkafloksins í Vágum.

# Kunnaðu seg um vinnu í Vágum

**Mánadagin vóru umleið 70 næmingar av Føroya Handilsskúla á ferð í Vágum og kunnaðu seg um vinnuna í oynni**

UNDIRVÍSING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Næmingar úr trimum flokkum á Føroya Handilsskúla vóru mánadagin vesturi í Vágum og hugdu av ymskum vikjum og fyritøkum i oynni.

Ein teirra, ið hitti næmingarnar, var Terji Nielsen, kunningaleiðari hjá Felagnum Vágar.

Hann greiðir frá, at talan var um lið í eini verkætlan, handilsskúlanæmingarnir hava í samband við undirvísingina. Teir kanna virki og gera metingar og lýsingar av teimum, sigur hann.



*Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum, greiddi handilsskúlanæmingunum frá um Kunningarstovuna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sjálvur hitti Terji Nielsen næmingarnar á Hotel Vágum, har hann greiddi teimum frá virki sínum sum kunningrleiðari, og hvat Kunningarstovan hevst at og kanska ikki minst, ætlandi skal gera, sigur hann.

Næmingarnir, sum vóru umleið 70 í tali, vóru úr trimum flokkum á Handilsskúlanum. Talan var kortini ikki um allar flokkarnar, tí einir tveir vóru eftir.

Næmingarnir lótu væl at, sigur kunnignarleiðarin. Tei hildu seg vera væl komnar í oynni, og fegnaðust um, at opinleikin var stórur á virkjum og fyritøkum, tey vitjaðu.



# Samgongan fær ein síðsta kjans

**Eftir djúpa samgongukreppu, eru formenninir í samgonguflokkunum komnir til, at eitt samstarvsráð skal skapa arbeiðsfrið í samgonguni. Samstundis er avtalað, at Anfinn Kallsberg og Høgni Hoydal skulu fáa betri tamarhald á sínum tingmonnum. Jenis av Rana, sum hótti við at siga samgonguna upp, er nøgdur við semjuna**

SAMGONGUSEMJA
*Ingi Rasmussen*

Í góðveðrinum fyrrapartin týsdagin kom loksins hvítur roykur frá Gamla apotekinum.

Eftir drúgt fundarvirksemi bæði fríggjadagin, mánakvøldið og aftur týsmorgunin komu teir fýra floksformenninir í samgonguni út av flokshølunum hjá Fólkaflokkinum og kundu boða frá, at teir geva samstarvinum í samgonguni nýtt lív.

Tjóðveldisflokkurin hevur umhugsað støðuna í útvið tvær vikur. Nú er flokkurin komin til, at samgongan fær ein síðsta kjans.



*Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg skulu gevast at tosa í hvør sína ætt. Og teir skulu inn í tingbólkarnar at stramma upp. Tað er semja um eftir fundarvirksemi á Gamla apoteki um dagarnar*
*Mynd: Jens K. Vang*

## Í arbeiðsklæðini

Teir fýra floksformenninir, Anfinn Kallsberg, Høgni Hoydal, Kári P. Højgaard og Jenis av Rana, vóru samstundis avgjørdir um, at skal tað bera til, má arbeiðsfriður aftur valda.

Á fundinum vóru nøkur ítøkilig mál viðgjørd, teirra millum sjálvstýrismálið, fiskivinnumál og sosialmál, sum flokkarnir skulu finna felags loysnir á. Avgerandi er, at um samgongan slitnar, so skal tað vera upp á politisk mál og ikki persónlig mál. Um samgongan so heldur, fáa vit at vita næstu mánaðirnar, segði Høgni Hoydal.

Anfinn Kallsberg løgmaður segði seg kunna staðfesta, at tað ikki eru politiskar ósemjur, sum samgongan strandar uppá, men persónsstríð. Hann viðgekk, at Tjóðveldisflokkurin hevur fingið langa umhugsanartíð, men nú ráddi um at fáa ófrið av vegnum, so samgongan kann fremja tann politikk, sum hon er samd um í samgonguskjalinum.

## Eitt samstarvsráð

Jenis av Rana setti samgonguni knívin fyri barkan upp undir vikuskiftið. Um løgmaður og varaløgmaður ikki kunnu semjast um at arbeiða saman, so tekur Miðflokkurin seg úr samgonguni, lovaði hann. Nú sær hann fyri sær, at tað fer at bera til, tí teir hava sett niður eitt samstarvsráð.

– Vit fýra floksformenn hava gjørt av, at vit møtast fast, har vit taka mál upp, sum eru aktuell og kunnu gerast aktuell. Samstundis eru vit samdir um, at hvør maður í sínum lagi ikki kann fara út í fjølmiðlarnar, sum best ber til, sigur Jenis av Rana og sipar til, at nógvar ósemjur hava verið fyri opnari mikrofon.

Tað hevur ljóðað, at Tjóðveldisflokkurin hevur sett ítøkilig krøv til samgonguna, men Jenis av Rana sigur, at hetta er ikki annað enn tað, sum stendur í samgonguskjalinum, og tí er lætt hjá samgonguflokkunum at taka undir við tí.

## Betri stýring

Jenis av Rana viðgongur, at floksformenninir hava tosað við stórum bókstavum. Men tað hevur verið neyðugt, heldur hann, tí samstarvslagið hevur ikki verið nóg gott. Hann hevur eitt nú rátt formonnunum í stóru flokkunum til, at teir fáa betri stýring á sínum fólki.

– Báðir (Høgni Hoydal og Anfinn Kallsberg, blðm.) hava lovað at fara inn í sínar tingbólkar at stramma upp. Teir hava stýrt alt ov leyst, tí tað ber ikki til, at hvør sum helst sigur hvat sum helst. Vit mugu hava meira dissiplin í stóru flokkarnar, og so mugu vit halda fundir, áðrenn málini gerast ov stór. So vænti eg, at tað fer at ganga, sigur Jenis av Rana.

# Yvirtøkulógin leingir stríðið um fullveldi

**Nýggi yvirtøkuleisturin leingir stríðið um ríkisfelagsskap og fullveldi, heldur Hans Pauli Strøm, sum í staðin mælir til, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark verða flutt yvir í fólkarættin og fráboðað ST, soleiðis sum landsstýrið upprunaliga ætlaði. Grundlógarnevndin kann gerast staðið, har semjan verður funnin, heldur hann**

SJÁLVSTÝRI
*Ingi Rasmussen*

Tey stóru orðini vórðu havd á lofti, tá nýggi sjálvstýrisleisturin hjá samgonguni gjørdist almennur. Løgmaður hevur skotið upp fyri danska forsætisráðharranum, at øll málsøki,




*Hans Pauli Strøm hevur orðað uppskot til eina tjóðskaparliga semju, sum hann heldur, at komandi grundlógarnevndin skal finna*
*Mynd: Jens K. Vang*

sum liggja uttan fyri heimastýrislógina, verða yvirtikin í eini og somu lóg, sum hevur fingið navnið yvirtøkulógin.

Danski forsætisráðharrin hevur sagt seg taka undir við tankanum, og embætisfólk í Danmark og Føroyum eru farin at viðgera uppskotið.

Vinnur uppskotið frama, skuldu allar yvirtøkur verið fingnar í eina fasta legu. A- og B-mál verða yvirtikin sambært heimastýrislógini, og málini uttan fyri heimastýrislógina, sum nú verða eyknevnd C-mál, verða yvirtikin undir einum.

## Ongin endi

Aðalstjórin í løgmálaráðnum nevndi hetta eina kollvelting fyri føroyskt sjálvstýri, tí nú slapst ikki longur innan fyri ríkisfelagsskapin.

Hans Pauli Strøm, skrivari í Javnaðarflokkinum, sum røddi á Grundlógarráðstevnuni í síðstu viku, er ikki samdur við aðalstjóran. Hann førir fram, at nýggja yvirtøkulógin er hægst ein kvantitativ broyting av heimastýrislógini. Men kvalitativt er heimastýrisskipanin fullkomiliga tann sama, heimildirnar og politiska valdið hjá heimastýrinum er fullkomiliga óbroytt. Og sum tað týdningarmesta, sigur Hans Pauli Strøm:

– ABC-heimastýrisleisturin hjá landsstýrinum ger als ikki tað, sum vit ikki longur eiga at sleppa okkum undan: At taka støðu til spurningin um støðu okkara í samveldi ella ríkisfelagsskapi við Danmark. Júst mótsatt av tí, sum aðalstjórin pástendur, so ger ABC-heimastýrisleisturin ikki enda á nøkrum kjaki. Tvørturtímóti standa allar ógreiður óloystar, og vit kunnu framvegis fara í langa tíð frameftir at tøva í sama tvídrátti sum tey seinastu 55 árini, førdi Hans Pauli Strøm fram á Grundlógaráðstevnuni.

## Yvir í fólkarættin

Hans Pauli Strøm mælti í staðin til ein sjálvstýrissáttmála. Sáttmálin skal staðfesta, at føroyingar eru tjóð og Føroyar eru land. Hann skal staðfesta sjálvsavgerðarrættin sambært fólkarættinum. Hann skal áseta valdsbýti millum londini. Hann skal áseta mannagongdir fyri at taka seg úr samveldinum. Hann skal samtykkjasat á fólkatkvøðu. Og so skal hann fráboðast Sameindu tjóðum, so hann verður lyftur upp á altjóða rætt.

Um ivi verður sáddur um, hvørt ein slíkur sáttmáli er í stríð við grundlógina, so eiga føroyingar ikki at taka sær av tí, helt Hans Pauli Strøm. Tað er ein danskur trupulleiki.

Meira ítøkiliga snýr uppskotið til sáttmála seg um, at heimastýrislógin verður sett úr gildi. Føroyar yvirtaka øll mál, uttan uttanríkis- og verjumál, tá ið løgtingið ger tað av. Greitt valdsbýtið verður í uttanríkis- og verjumálum, har Føroyar fáa allan avgerðarrættin, tá talan er um rein føroysk áhugamál.

Føroya løgting og landsstýri skulu verða hægsti myndugleiki í øllum málum undir føroyskum málsræði. Løgtingslógir fáa sama rættarstig sum fólkatingslógir og kunnu ikki setast til viks. Og Føroyar skulu hava egna grundlóg.